# Sigursrómurin vardi í fýra dagar

**HONDBÓLTUR** Team Klaksvík hevði lítið at bjóða í ítróttarhøllini á Skála í gjár. StÍF syrgdi fyri, at sigursrómurin vardi bara í fýra dagar hjá klaksvíkingum. Sveinur Justinussen var toppskjútti

Uni Holm Johannesen

Fríðin Ziskason, formaður og annar av venjarunum hjá Team Klaksvík, var týðiliga fegin, tá Team Klaksvík vann fyrstu stigini í hesum kappingarárinum.

– Tað hevur gingið rætta vegin hjá okkum síðani á jólum, og hetta var nógv tann besti dysturin, vit hava spælt í vetur, segði hann.

Sigursrómurin fekk hinvegin ein bráðan enda. Tað var lítið veiggj í uppflytarunum í gjár, tá StÍF vann greitt og einfalt við 14 málum.

Úrslitið var 34-20.

StÍF legði nógv fyri beinanvegin. Heimaliðið var á odda 11-2, tá fyrri hálvleikurin var hálvrunnin.

### Justinussen er við aftur

Sveinur Justinussen er aftur á liðnum hjá StÍF. Hann var eyðsýndur í álopsspælinum í gjár. Justinussen var toppskjútti við sjey málum.

Tað er væntað, at hann fer at geva liðnum hjá strandingum fleiri møguleikar í álopsspælinum. Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, segði í farnu viku, at Sveinur Justinussen hevur skotstyrki sum fáur í føroysku landskappingini.

# Stoltleikin var særdur

**HONDBÓLTUR** H71 rakti leikliga botnin, tá hoyvíkingar taptu heilt óvæntað fyri Team Klaksvík mikukvøldið. Særdi stoltleikin var movitatiónin, tá H71 flongdu kollfirðingar, sigur Dánjal Torgarð

Uni Holm Johannesen

– Tað sum bara ikki skuldi henda, hendi í Klaksvík í kvøld, skrivaði heimasíðan hjá H71 fyrr í vikuni.

Hoyvíkingar taptu, sum fyrsta liðið nakrantíð, fyri Team Klaksvík í bestu hondbóltsdeildini. Tað var eyðmýkjandi.

Særdi stoltleikin legði hinvegin lunnar undir stórsigurin á KÍF í gjár. Tað heldur Dánjal Torgarð, sum skeyt seks mál.

– Vit vildu vísa hesaferð, hvat vit veruliga duga. Fremst av øllum var hugburðurin einanstandandi. Allir góvu alt, teir áttu, og tá plagar at ganga okkum væl. Dysturin móti Team Klaksvík er gloymdur, og vit prógvaðu, at vit eru komnir víðari, sigur Dánjal Torgarð.



**REISTUST AFTUR**

*Hoyvíkingar reistust aftur eftir óvæntaða tapið fyri Team Klaksvík mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Skifti fólk

KÍF skal spæla steypafinalu næsta vikuskiftið. Jan Ottesen, venjari, framdi fleiri broytingar í dystinum, og fleiri av stuðulsleikarunum sótu stundum uttanfyri. Serliga eftir steðgin ørkymlaði tað spælið móti hoyvíkingunum, sum vóru sannførandi.

Dánjal Torgarð legði hinvegin ikki til merkis, at Jan Ottesen broytti liðið ofta. Hann vísir á, at spæliskipanin hjá kollfirðingum leggur altíð upp til nógvar broytingar gjøgnum dystin.

– Teir noyðast at skifta nógv út við teirra spæliskipan. Eingin orkar at dekka offensivt og spæla álopsspæl í samfullar 60 minuttir og samstundis vera effektivur, sigur Dánjal Torgarð.

Eitt mál skilti liðini í hálvleikinum. H71 legði bradliga fyri eftir steðgin og vann sær greiða leiðslu. Munurin øktist so líðandi.

Endaliga úrslitið var 32-22.

### Skulu verða betri

H71 spælir ongan leiklut í stríðnum um finalupláss. Hoyvíkingar eru seks stig aftan fyri KÍF, sum er nummar tvey.

Dánjal Torgarð ger greitt, at málið hjá H71 er fremst av øllum at gerast betri fyri hvønn dyst.

– Vit kunnu ikki hugsa um finalupláss. Vit noyðast taka ein dyst í senn, og síðani síggja, hvar tað tekur okkum, vísir Dánjal Torgarð á.

H71 vitjar í Vestmanna næsta vikuskiftið.

*uni@sosialurin.fo*

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 17 | 602 | 460 | 142 | 33 |
| 2 | KÍF | 17 | 478 | 445 | 33 | 22 |
| 3 | Kyndil | 18 | 467 | 465 | 2 | 19 |
| 4 | VÍF | 17 | 471 | 436 | 35 | 17 |
| 5 | H71 | 17 | 461 | 456 | 5 | 16 |
| 6 | StÍF | 17 | 437 | 448 | -11 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 17 | 400 | 606 | -206 | 2 |

### **StÍF – Team Klaksvík** 34-20 (19-11)

Dómarar: Thomas Juul Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 3-1**
**20 min.: 13-3**
**40 min.: 22-12**
**50 min.: 29-15**

**StÍF:** Sveinur Justinussen 7, Bent Djurhuus 5, Fríði Djurhuus 4, Jóannes Prestá 4, Leivur Justinussen 3, Jørmund Joensen 3, Steinar Prestá 2.
**Team Klaksvík:** Hanus Norðberg 8, Zarko Pejovic 7, Sámal T. Olsen 3, Gunnar á Steig 1, Dánjal Kjærbo 1.
Útvísingar: StÍF 1, Team Klaksvík 4.

### **H71 – KÍF** 32-22 (14-15)

Dómari: Heri Petersen og Hanus Kúrberg

**10 min.: 3-5**
**20 min.: 11-11**
**40 min.: 21-18**
**50 min.: 26-19**

**H71:** Bogdan Florea 13, Dánjal Torgarð 6, Sigmundur Dahl 4, Esbern Patursson 3, Ári J. Olsen 3, Poul Kjartan Dam 2, Rúni W. Højgaard 1.
**KÍF:** Agnar Joensen 6, Gert Hansen 5, Niklas Reginsson 4, Andrias Nielsen 3, Ingi Johannesen 1, Tony Weyhe 1, Suni Johannesen 1, RegiPetersen 1.
Útvísingar: H71 3, KÍF 7.

### **Kyndil – VÍF** 27-27 (11-18)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 6-4**
**20 min.: 8-10**
**40 min.: 17-22**
**50 min.: 22-23**

**Kyndil:** Høgni Klein-Olsen 6, Karl Jóhan Djurhuus 6, Bárður Johannesen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Rani Ellingsgaard 3, Rúni Johansen 2, Kenn Zachariasen 1.
**VÍF:** Áki G. Olsen 8, Sámal Joensen 7, Rúni Fossdal 5, Bjarti Hansen 4, Magnus Muller 2, Holgar Durhuus 1.
Útvísingar: Kyndil 4, VÍF 1.

# Úrslitið tændi bara KÍF

**HONDBÓLTUR** Kyndil og VÍF býttu stigini millum sín og tóku sostatt ikki av møguleikanum at ota seg nærri KÍF, sum tapti í Hoyvík í gjár. Úrslitið tændi hvørgum av liðunum ella spenninginum í oddastríðnum

Uni Holm Johannesen

Kyndil og VÍF høvdu tamarhaldið á hvør sínum hálvleiki. Tað er, sum heimasíðan hjá Kyndli skrivar.

– Vestmenningar iðra seg um seinna hálvleik, og kyndilsmenn spyrja, hvat gekk galið í fyrra hálvleiki, er skrivað.

Liðini fylgdust fyrstu løtuna, men miðskeiðis í fyrra hálvleiki fór VÍF avstað og vann sær eina greiða leiðslu. Vestmenningar vóru eitt skifti á odda við sjey málum.

Heimaliðið var sum hamskift eftir steðgin. Verjuspælið var munandi meira sannførandi, og tað kom av álvara veiggj í álopsspælið. Høgni Klein-Olsen stóð seg millum annað væl.

VÍF var á odda 23-16, tá ellivu minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki. Næstu tólv minuttirnar fingu vestmenningarnir einki mál. Tá teir loksins fingu hol á aftur, var Kyndil á odda 25-24.

Hans Áki Dal-Christiansen hevði møguleikan at tryggja Kyndil bæði stigini, men Eli Muller vardi fyri í seinastu royndini.

### Hava runnið aftaná

Kyndil og VÍF hava roynt at vunnið seg nærri finaluplássinum seinastu vikurnar, men liðini hava ikki tikið av gyltu møguleikunum. Bæði Kyndil og VÍF stevndu móti sigrunum í dystunum móti KÍF í januar, men kollfirðingar vunnu seg aftur seinastu løtuna.

Í gjár tapti KÍF fyri H71. Men Kyndil og VÍF snávaðu aftur. Javnleikurin í høllini á Hálsi blæsir ikki stórvegis spenning í finalustríðið aftur.

*uni@sosialurin.fo*